# Arbeiða fyri at minka um skaðarnar

**Hesar seinastu dagarnar hevur árligi norðurlendski fundurin hjá teimum, ið vara av sjóartryggingum, verið á Hotel Føroyum. Okkurt um 85 fólk úr flestu norðurlendsku londunum hava luttikið á fundinum**

NORÐURLENDSKT SAMSTARV
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Ikki færri enn 85 útlendskir gestir tóku lut á árliga norðurlendska fundinum um sjóartryggingar, ið var á Hotel Føroyum*
*Mynd: Terji Nielsen*

Fyri fyrstu ferð nakrantíð verður árligi aðalfundurin hjá Nordisk Søforsikringspool hildin í Føroyum. Nordisk Søforsikringspool er felagsskapurin hjá øllum teimum tryggingarveitarum í Norðanlondum, sum hava við sjóartryggingar at gera.

### Eisini upplivað Føroyar

Tey einstøku norðurlendsku londini hava hvør í sínum lag eitt landsfelag fyri veitarar av sjóartryggingum, og hesi landsfeløg eru síðani limir í Nordisk Søforsikringspool. Føroysku tryggingarveitararnir eru limir í danska landsfelagnum, og hava fleiri ferðir áður luttikið á slíkum norðurlendskum fundum. Í ár valdi danski landsfelagsskapurin, ið fyriskipar norðurlendska fundin, at hava fundin í Føroyum, og tað tykist teir verða væl nøgdir við.



*Jens Peter Tranberg v.m. og Aage Sørensen hava fyriskipað norðurlendska fundin um sjóartryggingar, sum hevur verið í Føroyum fyrr í víkuni.*
*Mynd: Terji Nielsen*

Teir báðir danarnir, ið hava fyriskipað fundin, Jens Peter Tranberg frá Forsikring & Pension og Aage Sørensen frá CNA Insurance, siga, at fundurin í Føroyum hevur verið stak væl eydnaður. Sjálvur aðalfundurin var hildin mánadagin, men teir 85 norðurlendsku luttakararnir komu til landið longu leygardagin, so høvi var eisini til at hyggja eitt sindur nærri at Føroyum. – Tá ið nú fundurin var í Føroyum, hildu vit tað verða hóskandi, at luttakararnir eisini loyvi at síggja tykkara vakra land eitt sindur nærri, sigur Jens Peter Tranberg. Tískil var sunnudagin skipað fyri einari bussferð til Norðoyggjar, og millum annað var vitjað á Viðareiði, har vit fingu okkum ein bita, greiðir Jens Peter Tranberg frá.

### Fyribyrgjandi arbeiði

Tá ið allir veitararnir á tí norðurlendska tryggingarmarknaðinum hittast soleiðis regluliga, eru tað altíð nøkur, ið hava lyndi til at huga, at hetta mest er álíkt einum kartelli, sum ger innanhýsis prísavtalur, og Aage Sørensen sigur, at tað er væl skiljandi, at fólk hugsa so, men hann avsannar tó, at nakrar prísavtalur verða gjørdar. – Tað hevði ikki nyttað nakað hjá okkum at gjørt slíkar prísavtalur, tí tá ið talan er um sjóartryggingar, kann tryggingartakarin bara venda sær til ein veitara uttan fyri Norðanlond, um hann heldur okkara prísir verða ov høgar, tí hann kann velja frítt, um teknar trygging hjá einum norðurlendskum veitara ella onkrum uttan fyri Norðanlond, sigur Aage Sørensen.

– Høvuðsendamálið hjá okkum við at hava slíkar norðurlendskar fundir á hvørjum ári er, at vit á henda hátt kunnu tosa saman um, hvussu vit á besta hátt í felag kunnu bjóða norðurlendska tryggingarmarknaðin fram til áhugaðar kundar. Harafturat brúka vit eisini ein stóran part av tíðini til at kjakast um, hvussu vit kunnu verða við til at fyribyrgja skaðar til frama fyri bæði viðskiftafólkini og okkum sjálvi, sigur Aage Sørensen. – Tað vil siga, at samanumtikið kann sigast, at vit arbeiða við at menna tað produkt, sum vit bjóða kundunum, og tað týdningarmiklasta hjá okkum í hesum sambandi er at menna norðurlendska marknaðin fyri sjóartryggingar, og tað gera vit við millum annað at verða við í I.O.M.I (International Union of Marine Insurance), leggur Jens Peter Tranberg afturat.

Norðurlendski fundurin um sjóartrygginar endaði mánakvøldið, og útlendsku gestirnir fóru av landinum aftur í gjár.

# Fiskavirking verður selt sum ein eind

**Nevndin í Framtaksgrunninum ætlar sær ikki at gera nakað ítøkiligt søluarbeiði fyribils fyri at selja Føroya Fiskavirking, men tó hevur nevndin samtykt at Fiskavirking verður selt sum ein eind**

FISKAVIRKING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



Fyri einum ári síðani setti nevndin í Framtaksgrunninum ein arbeiðsbólk, sum hevði til uppgávu at gera tilfar, ið kundi nýtast sum grundarlag til at arbeiða víðari við fyrireikan av sølu av Føroya Fiskavirking. Arbeiðsbólkurin er komin á mál við sínum arbeiði, og nevndin í Framtaksgrunninum hevur eisini viðgjørt málið.

### Arbeiða víðari við at betra sølumøguleikarnar

Í einum tilmæli til nevndina í Framtaksgrunninum mælir arbeiðsbólkurin til, at arbeitt verður framhaldandi við at gera tilllagingar á teimum einstøku virkjunum kring landið við tí endamálið at betra um sølumøguleikarnar. Hesum tilmæli hevur Framtaksgrunnurin tikið undir við, og grunnurin ætlar sær heldur ikki at gera nakað ítøkiligt søluarbeiði, meðan hesar tillagingar verða gjørdar.

Tó ger Framtaksgrunnurin greitt, at øll partbrøv, sum Framtaksgrunnurin eigur, sum meginregla altíð eru til sølu, og tí er Føroya Fiskavirking eisini til sølu, um nakað áhugavert boð verður lagt á borðið, sigur grunnurin í einum tíðindaskrivi. Framtaksgrunnur Føroya hevur havt fyrispurningar frá keyparum um Føroya Fiskavirking, men enn er hetta ikki endað við nøkrum ítøkiligum samráðingum.



# Frisørar kravdar eftir pengum fyri útvarpstónleik

**Danskur felagsskapur er farin í hernað ímóti tveimum føroyskum frisørum, tí tær hava Útvarp Føroya standandi frá í salongini**

KODA PENGAR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Stendur tað til tónleikafelagsskapin Koda, skal Salong Tóta hvønn ársfjórðing rinda góðar 700 kr. í kodapengum*
*Mynd: Jens Kristina Vang*

– Skulu vit rinda pengar til Koda, eiga allir læknar, tannlæknar og kioskir eisini rinda pengar til Koda, og tað gongur sjálvsagt ikki.

Seinastu tvey árini hevur Tóta Sørensen, sum eigur Salong Tótu í Havn, keglast við danska tónleikafelagsskapin, Koda. Koda krevur av Tótu, at hon rindar pening til tónleikafelagskapin, tí hon hevur Útvarpið standandi frá í salongini.

Koda er danskur felagsskapur, sum hevur upphavsrættin hjá tónleikarum um hendi. Felagskapurin krevur pening fyri tón-leikarar, tá teirra tónleikur verður framførdur á konsert ella í útvarpi.

Trætan millum Salong Tótu og Koda snýr seg um, hvørt Tóta hevur loyvið at hava Útvarpið, har nógvur tónleikur verður spældur, frá, uttan at hon rindar pening til Koda.

– Trætan er um hvørt, tað er eg sjálv, sum spæli tónleik, ella tað er Útvarpið, sigur Tóta.

Partarnir hava havt ilt við at finna eina semju, og málið er tí enda hjá fútanum. Fyrsti fyrireikingarfundur í málinum var týsmorgunin í málinum.

### Tvær útvaldar

Í Føroyum eru um 80 frisørar, men kortini hevur Koda einans sett seg í samband við tvær av teimum. Tóta Sørensen greiðir frá, at hon sýtir fyri at gjalda tær 700 krónurnar hvønn ársfjórðing, sum Koda krevur av henni.

– Eg rindi bæði útvarpsgjald heima og fyri salongina. Tað er ikki so, at eg havi nakað diskotek, og tí skilji eg slettis ikki kravið hjá teimum. Útvarpið koyrir spakuliga allan dagin, og hevur tú í huga allan larmin inni í eini hárfríðkanarstovu, gevur tað púrt onga meining, at eg skal betala hasar 700 krónurnar fyri hvønn ársfjórðing, sigur Tóta Sørensen.

Hon leggur afturat, at fyri miðal fyritøkur er tað ein ómetaliga tung byrða at skula gjalda Koda pengar hvønn ársfjórðing.

### Lógin talar fyri

Áðrenn okkara evstamark, hevði tað ikki eydnast okkum at fáa endaliga úrskurðin í trætuni millum Koda og Salong Tótu. Tóta Sørensen var ikki ov bjartskygd um, at tað skuldi eydnast henni at vinna sakarmálið.

– Í upphavslógini stendur, at upphavsrættur fevnir um frisørar, sólsentur og handlar, og tí peikar lógin ímóti okkum. Eg haldi kortini, at lógin skuldi verið broytt. Okkara virksemi er eitt handverk og ikki ein handil, ið er fevndur av sølu og tænastu, og tí áttu við slettis ikki at verið fevnd av hasi lógini, sigur Tóta Sørensen at enda.

# Gøtu skúli tríati



**Í dag, mikudagin 16. juni verður »nýggi skúli« tríati og í samband við tað, fer skúlin at hátíðarhalda dagin**

HÁTÍÐARHALD

Hátíðarhaldið fyri skúlabørnini verður mikumorgunin og fyri tey tilkomnu um kvøldið kl. 19.00.

Í samband við dagin verður ein myndaframsýning í skúlanum við myndum frá hesum tíðarskeiði - floksmyndum, myndum av ymiskum, ið farið er fram í skúlanum hesi árini og øðrum myndum, sum hava samband við skúlan.

Eisini verður nakað av eldri myndum at síggja.

Høvi verður eisini at síggja skúlan – og øll eru hjartaliga vælkomin, sigur Karl Thomsen, skúlastjóri í Gøtu skúla.

**Leiðari til fíggjardeildina**

Søkt verður eftir fíggjarleiðara til høvuðsdeildina hjá Føroya Shell í Tórshavn.

Tá verandi fíggjarleiðari eftir gott 17 ár í starvinum eftir egnum ynski hevur valt at taka við øðrum uppgávum í fyritøkuni, hava vit brúk fyri einum nýggjum leiðara til fíggjardeildina.

**Starvið**:
Talan er um eitt sjálvstøðugt og áhugavert starv í einum spennandi umhvørvi. Leiðarin hevur alla ábyrdina av fíggjardeildini herundir
· ger av ávegis- og ársroknskapi
· rapportering til útlendska móðurfelagið
· fíggjarætlanum o.t.
· dagligari leiðslu og skipan av deildini
· roknskaparlig umsiting og samskifti við avgreiðslurnar og egnar støðir kring landið.

Leiðarin er partur av leiðslubólkinum við beinleiðis tilvísing til stjóran.

**Førleikakrøv**:
Til starvið krevst holl ástøðilig útbúgving ella onnur viðkomandi útbúgving. Dentur verður lagdur á leiðaraevnir og royndir, umframt at tú ert arbeiðssamur og dugir væl at samskifta. Góður kunnleiki í enskum er neyðugur.

**Vit bjóða**:
Eitt fjølbroytt, spennandi og sjálvstøðugt starv við góðum møguleikum fyri persónligari menning, men samstundis eitt krevjandi starv. Vit hava góðar arbeiðsumstøður og trygg starvsviðurskifti. Góð løn í samsvar við útbúgving og royndir. Eftirlønarskipan er knýtt at starvinum.

**Umsóknir**:
Skrivligar umsóknir skulu verða innlatnar í seinasta lagi mánadagin 21. juni og skulu sendast til P/F Rasmussen & Weihe, statsautoriserað grannskoðarafelag, á Glaðsheyggi, FO-100 Tórshavn, telefon nr 351700, har nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Jóannes Olsen ella Klaus Rasmussen. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

www.shell.fo